# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óvirkin heilivágur

Sum kunnugt samtykti danska stjórnin um vikuskiftið kreppuhjálparpakka til danska bankakervið. Tá ið vit umrøddu hjálparpakkan her í blaðnum mánadagin, var bjartskygni stórt í politiska umhvørvinum í Danmark. Stjórnin hevði fingið til vega eina loysn, ið fevndi um 35 milliardir danskar krónur, sum skuldu leggjast í grunn til tess at tryggja peningin hjá donskum og harvið eisini føroyskum innlánarum.

Eitt aðalendamálið við hjálparpakkanum var at endurskapa álitið millum bankarnar, heimligar so væl sum útlendskar. Tiltakið skuldi eisini tryggja, at tann skipan við sínamillum lánum, ið er ein fortreytin fyri nútímans bankavirsksemi, skuldi fara í gongd aftur. Henda skipan var mestsum steðgað upp, og bankarnir vóru givnir við at tryggja hvørjum øðrum gjaldføri. Men hóast tað nú eru liðin trý samdøgur, síðan politiska semjan varð gjørd, so sæst einki tekin til bata í donsku fíggjarskipanini. Tá keypskálin í Keypmannahavn læt upp í morgun, fullu partabrævakursirnir framvegis. Tað eru serstakliga bankapartabrøvini, sum fella og hetta merkir, siga eygleiðarar, at álitið ikki er endurskapað enn. Hetta vísir seg eitt nú við, at danskir bankar hava torført við at lána pening uttanlanda, og gevur hetta bankunum gjaldføristrupulleikar.

Í øllum hesum hurlivasanum hevur danski tjóðbankin hækkað rentuna, og hetta gjørdi, at privatu peningastovnarnir alt fyri eitt fylgdu eftir. Rentuhækkingin er komin óvart á danir. Kundar eins væl og peningastovnar høvdu roknað við, at eitt óbroytt rentustøði var ein fortreytin fyri hjálparpakkanum. Men danska krónan kom undir trýst, orsakað av lutfalsliga lága rentustøðinum, og peningurin byrjaði at renna út av landinum móti londum við hægri rentustøði.

Hóast hjálparpakkin sostatt enn einki hevur bøtt um støðuna hjá peningstovnunum, so eru avvarandi danskir myndugleikar bjartskygdir. Teir halda seg vita, at ein orsøkin til, at hjálparpakkin enn ikki er farin at virka, er, at útheimurin ikki fær álit á danska fíggjarmarknaðin, fyrr enn Fólkatingið hevur samtykt ta lóggávu, ið skal til fyri at fáa trygdarskipanina at virka. Tað fara við øðrum orðum at ganga einir fjúrtan dagar, til vit fáa at vita, um heilivágurin hjá stjórnini, Javnaðarflokkinum, SF og teimum radikalu fer at virka. Vit her í Føroyum hava alla orsøk til at ynskja, at krepputiltakið hjá donsku stjórnini fer at virka, tí okkara peningastovnum stendur í boði at fara uppí nýggju trygdarskipanina, og vit eru partur av alheims kervinum. Politiskur meiriluti tykist vera fyri neyðugu lóggávuni, ið er komin á tingborð. Her er borið skjótt at, og so er bert at vóna, at fíggjarliga óndarveðrið ikki rakar okkum. Vit fingu okkara í nítiárunum og tola illa enn eina kreppu.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**41. partur**

Seinast nevndi eg um loyndarmálið, sum Paulus skrivar um í efesusbrævinum. Hann sigur hetta í 3. kapitli, 1-11 vers.

Tí boyggi eg knø míni, eg, Paulus, fangi Krists Jesu fyri tykkum, tit heidningar - um tit annars hava hoyrt um húshaldið við teirri náði Guds, ið mær er givin til tykkara, at við opinbering varð loyndarmálið mær kunngjørt, soleiðis sum eg frammanundan stutt havi skrivað.

Av tí kunnu tit, táið tit lesa tað, skilja kunnskap mín um loyndarmál Kristusar, sum í farnum ættarliðum ikki varð menniskjabørnunum kunngjørt, soleiðis sum tað nú við Andanum er opinberað heiløgu ápostlum og profetum Hansara:

At heidningarnir við eru arvingar, hoyra við til limið og eiga part við í lyftinum í Kristi Jesusi við evangeliinum. Tænari tess eri eg vorðin eftir teirri náðigávu Guds, ið mær er givin við veldiga mátti Hansara.

Mær, sum alraminst havi at týða av øllum heiløgum, varð henda náði givin, at kunngera heidningunum evangeliið um órannsakiliga ríkdóm Kristusar og at upplýsa øll um, hvussu húshaldið er við loyndarmálinum, ið frá ævigum tíðum hevur verið fjalt í Gudi, sum alt hevur skapt - fyri at margfaldi vísdómur Guds nú við samkomuni skuldi verða kunngjørdur tignunum og valdunum í Himli, Hetta er æviga fyriætlan Guds, sum Hann fullførdi í Kristi Jesusi, Harra okkara.

So hóast at Gud longu í fyrstu mósebók gav Ábraham lyfti um, at í avkomi hansara skuldu øll fólkasløg á jørðini verða signað, so finna vit ongastaðni í gamla testamenti samkomuna nevnda beinleiðis, hon var eitt loyndarmál.

Men í nýggja testamenti finna vit hana, sum vit longu hava sæð. Tey flestu brøvini hjá Paulusi eru til samkomur. Vit síggja klárt, tá ið vit lesa tey og øll hini brøvini í nýggja testamenti, at katolikkakirkjur, ortodoksar kirkjur, statskirkjur ella fólkakirkjur, er ikki tað, sum nýggja testamenti lærir okkum um Hetta er vituligt. Kristus er høvur samkomunar. Í kirkjunum eru menniskju høvd, kongar ella drotningar, pávin ella okkurt annað menniskja. Hetta eru menniskjans uppfinnilsir blandað saman við kristindóm. Hesar kirkjur eru ikki samkoma Guds. Tó eru trúgvandi menniskju innan fyri hesar felagskapir eisini. Hetta liggur so nógv til menniskju at gera, at blanda saman. Vit finna hetta í gamla testamenti fleiri ferðir. Tá ið Áron gjørdi ta ræðuligu syndina at gera ein gullkálv, segði hann samstundis hetta :" Í morgin verður høgtíð fyri Harranum." Á sama hátt tá ið Jeroboham ísraelskongur lat gera tveir gullkálvar, so eftirlíknaði hann ta røttu gudstænastuna eitt sindur, men gjørdi tað á ein annan hátt, eftir sínum uppfinnilsi.

Men nýggja testamenti er greitt. Samkoma Guds er tey sum eru fødd av nýggjum við trúnni á Kristus. Lat meg enda við hesum orðum av munni Jesusar:

"Eg havi opinberað navn Títt fyri teimum menniskjum, ið Tú hevur givið Mær av heiminum; tey vóru Tíni, og Tú gavst Mær tey, og tey hava hildið orð Títt.

Tí orðini, ið Tú gavst Mær, havi Eg givið teimum, og tey hava tikið við teimum og kent av sonnum, at Eg eri gingin út frá Tær; tey hava trúð, at Tú hevur sent Meg.

Eg havi givið teimum orð Títt, og heimurin hevur hatað tey, tí tey eru ikki av heiminum, eins og Eg eri ikki av heiminum.

Halga tey í sannleikanum! Orð Títt er sannleiki. "Jóh. 17, versini 6. 8. 14 og 17.

So kemur spurningurin til hvønn einstakan. Eri eg ein av hesum.

**Framhald**

## Ókeypis busskoyring

TURIÐ JACOBSEN
Ergoterapeutur

Sosialurin skrivaði herfyri um, at fólk við breki, sum eru meldað til MBF flutning, mugu gjalda hýruvogntakst aftaná kl. 16, meðan bussleiðin er ókeypis bæði dag og kvøld. Eg havi hug at nevna onnur havnarfólk, sum hvørki kunnu koyra ókeypis við MBF bussinum áðrenn kl. 16 ella við Bussleiðini. Talan er um gomul fólk, sum ikki eru før fyri at nýta bussleiðina, men sum heldur ikki lúka treytirnar fyri at brúka MBF bussin. Onkur av hesum gomlu hava avvarðandi ella onnur, sum hava møguleika fyri at koyra tey, men gomul fólk, sum ikki klára at nýta bussleiðina, ikki hava avvarðandi, sum kunnu koyra tey og ikki lúka treytirnar fyri MBF flutningi, mugu leiga hýruvogn.

Aftan á at bussleiðin var vorðin ókeypis, hitti eg eina eldri kvinnu, sum segði mær, at hon hvønn dag leigaði hýruvogn til og frá Landssjúkrahúsinum fyri at vitja mannin, sum var innlagdur har. Hon var nokkso illa gongd, brekka var til bussteðgiplássið og ikki var hugsingur um hjá henni at klára at ganga til og frá bussteðgiplássinum ella at ganga til og frá Landssjúkrahúsinum. Hon er neyvan nakað eindømi.

Sostatt er støðan nú, at eg, sum eri frísk og ferug og faktiskt væl kann ganga alla Havnina á tamb, kann koyra buss ókeypis fyri skattgjaldarans rokning, meðan gomul, illa gongd fólk noyðast at gjalda tað, sum tað kostar at koyra hýruvogn, tá tey skulu til og frá húsum. Eg kann ikki hugsa mær, at hesin mismunur er tilvitaður frá Tórshavnar kommunu, kanska bara eitt dømi um, hvussu stutt vit eru komin í hugburði, tá talan er um at hugsa líkarætt inn í tænastar.

### Gjald fyri valgreinar

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.